Lívdin
- í lívd hins hægsta

Januar 2008



# Gentubólkur



Í mai 2007 varð farið undir ein nýggjan gentubólk í Lívdini. Bólkurin er fyri gentur í øðrum og triðja flokki og hevur til endamáls at skapa trivnað millum genturnar.

Bólkurin hittist triðjahvørt fríggjakvøld í somu viku sum húsbólkarnir. Ábyrgdina fyri bólkinum hava Katrin á Lakjuni og Rachel Eysturtún. Um onkur genta í hesum aldursbólki av misgáum ikki er komin við í bólkin, heita vit á tykkum um at siga aðrari okkara frá.

Vit nýta høvið at ynskja øllum eitt av Harranum signað nýggjár.

*Katrin á Lakjuni, tel. 31 86 86*
*Rachel Eysturtún, tel. 32 32 82 / 52 32 82*

## Øll eru týdningarmikil

Sum eg hyggi at samkomuni, prísi eg Harranum fyri øll ættarliðini, vit hava í samkomuni. Vit eiga at gera alt fyri at binda ættarliðini saman, frá tí nýfødda barninum í vøgguni til elsta fólkið í samkomuni, sum er seingjarliggjandi heima.

Latið okkum ikki býta samkomuna upp í bólkar: børn, ung, vaksin, gomul o.s.fr. Vit mugu gera okkum ómak at tvinna tey ungu og tey eldru saman, menn og kvinnur, børn og ung o.s.fr. Máttu vit liva soleiðis í 2008, at øll somul − børn, ung, vaksin og gomul − kenna seg sum týdningarmiklan og neyðugan part av Lívdini.

Gott nýggjár!



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Jólaløtan 23. desember



*Anna D. Háberg*



*Petur Háberg*

Sunnudagin 23. desember varð skipað fyri eini jólaløtu í Lívdini við nógvum góðum tónleiki.

Millum tey, sum framførdu, vóru Karl Johannesen, Petur Háberg, Sanna á Borg Háberg, Jenny Old og Jóhan Magnus Olsen úr sangbólkinum Salt umframt lovsongsbólkurin í Lívdini.

Eisini sunnudagsskúlabørnini luttók, og Anna D. Háberg hevði eina hugleiðing um gleðiboðskapin. At enda sungu øll „Gleðilig jól" saman.

Sera nógv fólk var til jólaløtuna, sum var merkt av, at nógvir útisetar vóru komnir heim at halda jól.



## Jólagávurnar til russar

Aftur í ár vórðu jólapakkar givnir russarum, sum eru umborð á skipunum, ið liggja úti á redini. Pakkarnir vórðu latnir Faroe Agency, sum er føroyska



umboðið hjá russisku skipunum, millum jól og nýggjár. Í pakkarnar vórðu eisini russiskar traktatir lagdar.

Tilsamans vórðu 43 pakkar latnir. Hetta er nakað minni enn í fjør, sigur Lív Clementsen, sum er ein av fyrireikarunum.

## Keldan sum fyrimynd

Á Zareptaleguni hjá Lívdini, sum var frá 2. til 4. november 2007, var ein áhugaverdur fundur leygardagin 3. november.

Tveir gestatalarar vórðu bodnir til fundin: Pauli Høj og Dánjal Petersen frá samkomuni Kelduni í Skálafirði. Teir greiddu m.a. frá og vístu við myndum, hvussu samkoman hevur staðið saman um tann nýggja samkomubygningin.

Johan Syderbø og Árni Jakobsen greiddu frá arbeiðinum hjá byggibólkinum hjá Lívdini. Regin Hammer frá fíggjarbólkinum segði frá fíggjarligu gongdini, og Jógvan Zachariassen talaði um, at vit nú eru í sabbatsárinum – sjeynda árið eftir, at Lívdin byrjaði 26. august í 2001.



*Pauli Høj talar á Zarepta*

## Hildu jól á Filipsoyggjunum

Flestu okkara hildu jól heima ella saman við familjuni, men hesi jólini vóru nøkur úr Lívdini, sum hildu jól á Filipsoyggjunum. Tey vóru Ása og Ólavur Jøkladal, sum vóru trúboðarar har í nøkur ár, og Durita og Pauli Djurholm og børnini: Rannvá, Jóhan og Gunnvá.



*Ferðalagið helt jól saman við Liz og Ragnari Niclasen, trúboðarum á Filipsoyggjunum. Á myndini eru vinstrumegin frá: Durita Djurholm, Ragnar Niclasen og  Ása Jøkladal.*

## Gloymdar Bíbliur




Tá vit rigga av eftir møtini sunnudag, kemur tað javnan fyri, at ymsir lutir liggja eftir. Tað kunnu vera klædnalutir, bæði hjá børnum og vaksnum, prýðislutir, Bíbliur o.a.

Í einum plastikkassa, sum stendur við borðið í gongini við ymiskum lutum, eru fleiri Bibliur, sum eru gloymdar eftir á møtunum.

## Bønarbólkur fyri kvinnur



*Anna Maria og Poula*

Fyrsta leygardag í hvørjum mánaði savnast bønarbólkurin fyri kvinnur.

Áhugað kunnu venda sær til Onnu Mariu Anthoniussen (tel. 228826) ella Poulu Sørensen (220429).

## Tillukku við barninum



*(Modellmynd)*

30. oktober 2007 fingu Inga Samuelsen og Heri Petersen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 1. januar | (einki møti) |
| 8. januar | Húsbólkar (einki møti) |
| 15. januar | Bønarlív Jesusar (Poul Guttesen) |
| 22. januar | Bønarlív Jesusar (Poul Guttesen) |
| 29. januar | Húsbólkar (einki møti) |

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 6. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Nýtt ár við børnunum*<br>*Talari: Gunnar Nielsen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ærdur av Gudi*<br>*Talari: Símun Absalonsen* |

### Sunnudagin 13. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Nýtt ár við teimum ungu*<br>*Talari: Dánjal Petersen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Opið evni*<br>*Talari: Poul Guttesen* |

### Sunnudagin 20. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Nýtt ár við familjunum*<br>*Talari: Pauli Olsen*<br>*- Bøn fyri smábørnum* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Er í lagi at ivast?*<br>*Talari: Jens Wang* |

### Sunnudagin 27. januar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Nýtt ár við teimum eldru*<br>*Talari: Zacharias Zachariassen*<br>*- Bøn fyri smábørnum* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Samkoman og missión*<br>*Talari: Zacharias Zachariassen* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*



Gunnar



Símun



Dánjal



Poul



Pauli



Jens



Zacharias

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*